



*Chevrolet hava hoyrt til General Motors síðan 1918. Á myndini er ein Chevrolet Impala Sport Coupé frá 1958*

*General Motors keyptu týsku Opel verksmiðjuna í 1929. Hesir Opel Diplomat vóru gjørdir frá 1964-1968. Á myndini er eisini ein Opel Record frá sama tíðarskeiði*




prosent av Daewoo Company í Suðurkorea. GM hava eisini átt upp til 15 prosent í Fiat.

## Multinational fyritøka

General Motors Corporation er ein multinational fyritøka við høvuðssæti í Detroit, Michigan, í USA. Evropeiska høvuðssæti hjá GM er í Zurich í Sweis, og australska høvuðssæti er í Melbourne, Victoria, í Australia, har teir framleiða bilmerkið Holden. GM er eisini høvuðspartaeigari í GM Daewoo Auto & Technology Co í Suðurkorea.

Umleið 300.000 fólk starvast hjá General Motors í nógvum ymislum londum.

Síðan fyrst í 1930-unum hevur General Motors verið heimsins største bilaframleiðari, men í 2007 vórðu teir yvirhálaðir av Toyota.

Í dag framleiða General Motors hesi bilmerkini: Buick, Cadillac, Chevrolet, Daewoo, GMC, Holden, Hummer, Opel, Pontiac, Saab, Saturn og Vauxhall.

*Bilverksmiðjan Vauxhall Car Company í Onglandi var í 1925 yvirtikin av General Motors. Myndin: Vauxhall Cresta frá 1962*







*Vauxhall Cresta frá 1962*

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*